## DAGSINS MEINING

# Trygdarpolitiska kósin

Uppskot løgmanns til samtyktar frá 13. apríl í ár um trygdarpolitikk Føroya er ein varislig roynd at tillaga føroysk trygdarpolitisk fyrilit til eina nógv broytta verð. Øll lond í Europa hava ásannað, at eftir at Kalda Kríggið er endað, er heimurin mett út frá einum trygdarpolitiskum sjónarmiði broyttur. Hetta er tó ikki so at skilja, at verðin er vorðin tryggari og friðarligari. Heldur er tað tvørturímóti. Men verðin er ikki longur býtt upp í tveir stórvaldablokkar, og hesin veruleiki má sjálvsagt fáa trygdarpolitiskar avleiðingar við atliti at NATO.

Ein avleiðing av nýggju støðuni er, at NATO hevur átikið sær ein nýggjan og øðrvísi leiklut. Tað vil so vera, nú arvafíggindin Warzawasamgongan er horvin. Fleiri lond í Eystureuropa eru komin upp í NATO, og meta hesi lond, at hetta gevur teimum størri trygd. Tey vita, sum er, at ein dag fer eystureuropæiska stórveldið aftur at vakna úr sínum bjarnadúri og fer tá ivaleyst aftur at royna at tryggja seg við eini røða av puffaralondum kring síni landamørk. Møguliga kann NATO fyribyrgja hesi gongd. Hinvegin er lítið, sum bendir á, at nýggju eystureuropeisku og baltisku limalondini í NATO økja um trygdina í Europa. Til tess eru tey ov óstøðug reint politiskt, og søguliga arvagóðsið er ov tyngjandi. Tvey Norðurlond, Finland og Svøríki, hava ásannað hetta, og hava tí í farnu viku alment boðað frá, at tey fara ikki upp í NATO. Tey meta ikki, at NATO-limaskapur gevur økta trygd, og verða tí verðandi uttanfyri.

Hinvegin halda Ísland, Noreg og Danmark framvegis, at trygdin er at finna í NATO, og eru hesi lond tí heilhugaðir limir í verjufelagsskapinum. Landsstýrið er ivaleyst samt við hesi trý lond, og hevur ásannað, at skulu vit vera við, so tænir tað ikki føroyskum áhugamálum at halda fram í leiklutinum sum eitt slag av hvílandi limi. Landsstýrið mælir tí Løgtinginum til at samtykkja eitt uppskot, sum í høvuðsheitunum merkir, at landsstýrið framyvir skal hava innlit í og ávirkan á trygdarpolitikkin (les NATO). Herumframt eru nøkur punkt, ið nátúrliga fylgja av hesum. Uppskotið er eitt varisligt stig burtur frá tí principielt uttanveltaðu kós, sum Føroyar alment hava hildið síðan 1940. Tað er tí at vóna, at hetta uppskot verður væl og virðliga viðgjørt, og at allar hugsandi fylgjur av hesi broyttu trygdarpolitisku kós verða kannaðar, útgreinaðar og kunngjørdar. Vit fara at venda aftur til uppskotið í eini av komandi oddagreinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjey milliónir í menningarhjálp til fremmand lond meðan sálarsjúk ongan bústað hava?

**Svenning av Lofti**
*Næstformaður í Sinnisbata*



Meðan tíggjutals av okkara sálarsjúku medborgarum eru noyddir at búgva á sálarsjúkrahúsi ár eftir ár, tí okkara politikkarar ikki vilja játtað nógv mikið av peningi til bústaðir til sálarsjúk, tykist vera í lagi at lata 7 dýrabarar milliónir út av landinum.

Sambært Dimmalætting hósdagin 22. apríl hevur Jóannes Eidesgaard løgmaður lagt fram frágreiðing um altjóða menningarpolitikk í Føroyum tann 20. apríl. Hann helt at Føroyar kundu lata 10% í menningarhjálp, sum svarar til umleið 7 milliónir.

Mín meingin er, at so leingi sum tíggjutals yngri og eldri føroyingar ongan annan bústað hava uttan eitt kamar á psykiastrisku deild í Havn, við einari song, borði og stóli, sum einasta innbúgv er tað púra burturvið at økja menningarhjálpina við umleið 7 milliónum. Í summum førum eru fleiri á sama kamari, við ongum privatlívi.

Hví er tað nú knappliga so liðiligt at játta sjey milliónirnar til fremmand fólk, tá ið tað er ómøguligt at fáa meiri enn 4 milliónir á uppskotinum til nýggju fíggjarlógina til okkara heimleysu sálarsjúku?

Hví skulu tey sálarsjúku niðurprioriterast ferð eftir ferð á fíggjarlógini?

Heldur skuldu hesar sjey milliónirnar farið til tey sálarsjúku, sum ár eftir ár hava búð á sjúkrahúsi, tí tað almenna Føroyar niðurprioriterar tey við at siga, at tað er ikki meiri peningur til taks til tey sálarsjúku enn tær 4 milliónirnar, sum er settar av.

Peningur er til í landinum.

Tað er politiskur vilji sum tørvar.

Eg havi einki ímóti at vit hjálpa eftir førimuni, eisini út um landoddarnar. Men eg mótmæli at vit lata pening til onnur tá ið vit ikki kunnu veita okkara egnu sálarsjúku borgarum sømilig og verdugt lív. Kor teirra sálarsjúku eru óverdug og skammilig fyri okkara samfelag og okkara politikkarar.

Lat hasar umrøddu sjey milliónirnar (og fleiri) heldur fara til tey sálarsjúku. Tey menningartarnaðu og onnur, ið bera brek, eru eisini sera illa fyri og tørva eisini størri játtan.

# Jacob Vestergaard stríddist móti løgtingssamtyktini um miðnámsskúlan í Vági

**Hergeir Nielsen**



Fyri einum ári síðan samtykti løgtingið, at vit skuldu gera ein miðnámsskúla suðuri í Vági.

Harafturat samtykti løgtingið, at vit bygdu eitt meginbókasavn upp í skúlan, ið kommununar skuldu rinda ein part av.

Landsstýrismenn tjóðveldisfloksins virkaðu fyri, at hetta savn á náttúrligan hátt kundi knýtast at miðnámsskúlanum, og løgtingið samtykti eina verkætlan, har hetta lat seg gera.

Teir 300 fermetrarnir, ið kommunurnar skulu vera við at fíggja av meginbókasavninum, skuldi landið lata 50% í studningi til, og harafturat skuldi landið rindað 60% av rakstrinum. Av hinum 50% skuldi Vágs kommuna rindað 30%, meðan allar hinar kommunurnar í oynni einans skuldu rinda 20% av íløguni og 10% av rakstrinum.

Soleiðis upplýst samtykti løgtingið málið um bygging av miðnámsskúla og meginbókasavnið í Vági fyri umleið 50 mió.kr.

Talan var sjálvandi um eitt tilboð til kommunurnar. Tilboðið varð tíverri havnað, og málið er nú dottið niðurfyri.

Tað er stórt spell, at so skuldi vera. Átakið var til gagns fyri miðnámsskúlan, ungdómin, mentanina og almenn arbeiðspláss annars í Suðuroynni og ikki ein krígsavbjóðing, sum Jacob Vestergaard hevur fatað tað.

Vit raðfestu Suðuroynna fremst av øllum, og hildu okkum hava vunnið henni stórfingnar sømdir við einum víðkaðum miðnámsskúla og einum sera sámuligum tilboði til kommununar um at vera við at gera skúlan enn meira spennandi fyri okkum øll.

Lesa vit Jacob Vestergaard um vikuskiftið, síggja vit, at í hansara verð var meira umráðandi at vera ímóti Vágs kommunu heldur enn at vera fyri einum fyrstafloks miðnámsskúla.

Verri enn so øll toldu hetta og onnur framtøk okkara, og tíverri hava menn verið so firtnir, at teir eru farnir at drepa niður hetta og onnur framtøk, sum vit settu út í kortið.

• "Ein høvuðsmaðurin fyri hesum slátrinum er Jacob Vestergaard, ið sum borgarstjóri hevur slóðað undan og forða einum kommunalum samstarvi á hesum øki. Nú fólkaflokkurin fekk ræði á mentamálum var harafturat skjótt at fáa lívið av meginbókasavninum, og so varð gjørt."

### Jacob Vestergaard førdi knívin

Eftir at hava lisið ein stak firtnan Jacob Vestergaard verður ásannað, at hann ikki var ein høvuðsmaðurin, men sjálvur høvuðsmaðurin fyri at slátrað meginbókasavnið við miðnámsskúlan í Vági.

Jacob Vestergaard boðar frá, at hann sum borgarstjóri ikki varð samdur í teimum framtøkum, ið løgtingið og landsstýrið høvdu sett sær fyri at fremja heimanfyri Núpin, har hann sjálvur hevur sína dagligu gongd.

Undir øðrum keppi, nú sum formaður í Føroya Kommunufelag, sigur hann seg harafturat hava sagt nakað tað sama um virkna andróður sín móti vilja løgtingsins við eini størri íløgu í eini kommunu, sum Jacob Vestergaard ikki kann vera fyriuttan í tí dagliga.

Tað er ein erlig søk at hava aðra hugsan enn hana, ið løgtingið hevur. Tað hevur Jacob Vestergaard fullan rætt til, og sjálvandi hevur hann fullan rætt til at vera ímóti øllum átøkum okkara fyri Suðuroynni.

Hinvegin er tað í so bláoygt, um hann billar sær inn, at eingin heftir seg við andstøðu hansara móti løgtingssamtyktini og framburði og trivnaði um okkara leiðir, og serliga ikki, tá tað eyðnast honum at kollrenna framtøkini.

Av og á noyðast vit at tosa við stórum bókstavum, og talan er á ongan hátt um persónligt briksl, men um heilt vanliga kunning til borgaran.

Talan er um vanliga politiska viðger av einum máli, har Jacob Vestergaard er týðiliga firtin um, at støða hansara verður avdúkað.

Skúlin verður nú lagaður niður. Hann verður ein skerdur fuglur, ið als ikki fær tað flog yvir sær, sum vit ætlaðu honum.

Miðnámssskúlin í Vági skuldi gerast nakað heilt serligt fyri ungdómin og mentanina í Suðuroynni líka úr Sumba til Sandvíkar.

Hann skuldi harafturat verða eitt tilboð til ungdóm uttaneftir, sum kundi búleikast her, meðan hann nam útbúgving sína í Føroyum.

### Kommununar partur

Sjálvur havi eg einki havt við kommunala partin at gera, frásæð luttøku á einum fundi í Øravík, sum tingmenn valdir fyri valdømi vóru bodnir til av landsstýrismanninum í mentamálum.

Jacob Vestergaard møtti upp á hesum fundi og segði frá, at hann var ímóti ætlanini.

Einari almennari ætlan fyri 50 mió.kr., ið vit høvdu stríðst og lóggivið fyri at leggja niður í Vági.

Korta nei, segði Jacob Vestergaard. Hetta við einum almennum meginbókasavnið upp í miðnámsskúlan var ikki nakað fyri ungdómin í Suðuroynni.

Heldur ikki var tað nakað fyri tey tilkomnu, sum kundu stytt sær stundir har, og sjálvandi skuldu heldur eingi varðandi almenn arbeiðspláss spyrjast burturúr ætlanini.

Lesa vit Jacob Vestergaard, so síggja vit, hví hann var ímóti, at suðringar fingu hesar almennu sømdir.

Hann hevði snøgt sagt tikið sær tiknið av, hvør ið fyrstur hevði fingið fundarboð, og hvør legði fram hesa felags ætlan um kommunalt samstarv.

Málið spratt ikki úr tí rætta jørðildinum, sum hann málber seg, og hann sá bara forðingarnar fyri sær.

Sjálvandi fór eingin at trýsta kommunurnar í Suðuroynni til nakað sum helst, og líka so sjálvandi er, at hatta tilboðið ikki kemur aftur.

Eitt meginbókasavn verður ikki bygt í Suðuroynni í okkara tíð, tá tað ikki varð tikið av hesum gylta møguleikanum nú.

Í politikki eiga vit at taka av, tá møguleikarnir eru har, og ikki lata smálutir, so sum hvør fyrst hevur fingið eini fundarboð ella skipar fyri einum fundi, forða okkum vegin.

### Jacob Vestergaard sigur beinleiðis ósatt

Aðrar forðingar hjá Jacobi Vestertgaard vóru, at lærararáðið við skúlan skuldi vera ímóti hesi ætlan.

Hetta er beinleiðis ósatt, ein snaring av veruleikanum, og eitt bakbit móti lærararáðnum.

Jacob Vestergaard veit væl, at ein lærari virkaði ímóti hesum máli, og at tað eyðnaðist honum at sáa ein iva um tað í 2001, tá ið tað varð framlagt. Síðani tá tóku eisini lærararnir málið til sín.

Á heysti 2002 sóu lærarar við miðnámsskúlan líknandi projekt í Noregi, og tóku undir við tí, og á sumri 2003 samtyktu vit málið á tingi. Hesum framtøkum hevur Jacob Vestergaard sjálvandi ikki givið ans, tí hann vildi ju ikki vita av teimum.

Og enn eina ferð, so var talan um eitt tilboð til kommunurnar í Suðuroynni um ein stórfingnan skúlabygnað, sum kostaði kommununum uttanfyri Vág eina minni upphædd, sum eingin serlig fíggjarlig orka skuldi til at greiða.

Hetta var eitt einaferðs tilboð til ungdómin í Suðuroynni, sum kommunali samstarvsandin tíverri ikki orkaði at draga niður í seg, og tað var nú spell.

Hergeir Nielsen hevði einki við hetta mál at gera á kommunalum stigi. Tað veit Jacob Vestergaard fullvæl, og kundi hann spart sær útspillingar sínar í so máta.

Hann sigur sjálvur í grein síni um vikuskiftið, hví hann fekk stiknið til hetta mál, og hví tað var so umráðandi hjá honum at slakta tað.

Hansara áhugi er framvegis at stinga skør og vinna neisir, og at han so slaktar ein heilan stovn í Suðuroynni á vegnum, tað ger minni.

Jacob Vestergaard og hansara menn hava sólað sær í okkara framtøkum farnu árini. Nú sita teir við ræðið, og nú hava teir allar møguleikar fyri at fáa nakað at spretta úr egnum barmi.

Trongskygni, illvilji og beinleiðis ósannindi góvu teimum neyðugu møguleikarnar at kollrenna ein ynskidreymin hjá ungdóminum í Suðuroynni, og hann brúkti teir til fulnar.

Hvørji onnur framtøk teir fara at drepa niður, fáa vit so at síggja í tíðini sum kemur.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# 2000% meira í menningarhjálp

**Jan á Argjaboða**
*Tórshavn tann 22. apríl 2004*

Soleiðis kundi yvirskriftin hjá Jóannes Eidesgaard, løgmaðni í greinini í Dimmalætting í dag 22. apríl 2004, eisini veri.

2333% øking um menningarhjálpin hækkar úr 300.000,- kr. til 7 mio. kr. um árið.

Um støðið verður tikið í bráfeingishjálpini 2,7 mió. kr. so verður vøksturin bert 260%

ST mælir til at íðnaðarlondini í minsta lagið lata 0,7% av bruttutjóðarúrtøkuni.

Løgmaður mælir til at Føroyar lata 0,07% av bruttotjóðarúrtøkuni ella ein tíggjundapart av tí ST mælir til skal verða minsta mark.

Hann vísir á at vit eru ikki sjálvstøðug tjóð og krógvar seg aftan fyri ríkisfelagsskapin. Tað er undanførsla hansara fyri at tað er rímuligt at vit bert lata 0,07%.

Núverandi danska samgongan setti menningarhjálpina niður úr umleið 1% til 0,7% tá íð hon kom til og endamálið, at ganga á odda og vísa veg innan menningarhjálp, varð slept.

Fólk verða ikki mett av positivum tankum. Ofta verður tikið til at tað er tankin sum telur tá íð ein gáva verður givin. 7 mió. eru 7 mió kr., og at tær røkka longri í 3. heiminum enn í Føroyum er eingin ivi um.

Men 0,07% av bruttutjóðarúrtøkuni er sum ein skræddari í einum ávísum staði, um tosa verður um veruliga menningarhjálp.

Danida metir at tað kostar umleið 1 mio. kr. um árið at hava ein persón í verki í 3. heiminum (Asia). Hetta er ikki bert løn, men ferðaútreiðslur, trygging, íbúð, skrivstovuhald o.a.m. Tástani koma útreiðslurnar til verkætlanina.

Ein løgtingsfundir kostar 57.560,- kr. um tíman (ár 2002).

Ein háðan móti ST er tað um vit, sum ikki eru limir í ST, fara at lata 0,07 % av bruttutjóðarúrtøkuni einans 10 % av tí sum teir mæla til skal verða minsta mark. Hendan tankan vil eg mæla til at løgmaður letur verða við tankan.

Uppskoti frá løgmanni meti eg hava eitt einans endamál: at stinga Føroyar út í kortið, at sleppa uppí part, ikki at hjálpa.

Tað tekur tíð og kostar pengar at hjálpa um ein skilagóð millumlanda verkætlan skal gerast ið lýsir tørvin og "indsatsområdet" og minimerar vandan fyri mutur o.ø. Sjálvt dagføring av gjørdum avtalum tekur tíð.

3. heimurin stendur ikki ókritiskur sum tann glaði móttakarin. Tað liggur eitt arbeiði í at fáa loyvi at geva.

Tað krevur stabilitet og kontinuitet at hjálpa og ikki er ikki óvanligt at tað tekur eitt ár ella meira at fáa eina millumlanda avtalu í lag. Tá avtalan er fingin í lag kann farast til verka at finna samstarvsfelagar, høli og útbúgvið fólk at seta verkætlanina í gongd; eftirútbúgving av fólki, samstarv gerast við fíggjarstovnar o.m.a. Tað tekur tíð. Sum dømi kan nevnast at Danida vanliga ger 5-ára avtalur við tí í hyggju at leingja avtalurnar til 10 - 15 ár. Í Nepal eru teir aftan á 25 ár givnir at menna mjólkaframleiðsluna, tí nú megnar fólkið í landinum sjálvt at loysa hesa uppgávu. Innan orku fer Danida saman við øðrum gevaralondum at virka tey næst 15 - 20 árini. (um landið ikki gerst politiskt óstabilt).

USA (USAID) hevur verði 20 ár í Bangladesh fyri at hjálpa við at menna ravmagnskervið har.

Nú skal eg ikki sammeta føroyska hjálp við Danida ella USAID men gera vart við, at um ein vil vera við, so kann tað ikki verða frá fíggjarlóg til fíggjarlóg. Hjálpin má hava eitt longri perspektiv uppá minimum 5 ár og helst 10 ár.

Menna Føroysku vinnuna, tað gera vit við at geva henni møguleika at virka við í menningararbeiði í 3. heiminum. Tað vil í alstóran mun styrkja støðuna hjá tí føroysku vinnuni.

At virka í altjóðasamstarvi í torførum umhvørvi, tað mennir. Vit í Føroyum kunnu læra nógv og eitt stig framá er, hóast alt, eitt stig á vegnum.

Við at landið sjálvt fíggjar "lærupengarnar" hjá føroyskum virkjum at arbeiða í altjóða høpi ger, at fyritøkurnar fáa eina barlast (referenceir), so tær sleppa uppí part tá íð bjóðast skal uppá altjóða menningartiltøk, fíggjaðar av altjóða hjálparfelagskapum.

So talan er ikki um bert at geva. Um rætt verður borið at kunnu vit fáa tað margfalt aftur, øllum til gagns.

Um vit vilja hjálpa og ikki bert vísa flaggið, so eiga vit at fylgja tilmælium frá ST og nýta minst 0,7 % av bruttutjóðarúrtøkuni til menningarhjálp.

Um løgtingið játtar einar 75 mió. kr. hvørt ár tey næstu 5 - 10 árini hevði tað óiva borið til at farið undir einar 2-3 verkætlanir.

Løgmaður hevur rætt tá íð hann vísir á at vit skulu leggja okkum eftir at menna smá oyggjasamfeløg. Tá verður lættari at vísa á at hjálpin ger mun, og gleðin við at geva verður tað størri.

Tað verður eisini ólíka hugaligari at kunna líta í eyguni á útheiminum, tá íð staðfestast kann at vit fylgja ST tilmælinum.

Um løgtingið samtykkir bert at játta 0,07 %, so gev peningin til teir trúboðarar sum virka ókeypis ella nýtt upphæddina til bráðfeingis hjálp.

### Hjálp!

Tá íð innsavningar fara fram eru vit óførir at reypa um, hvussu nógv vit lata í hjálp við at sammeta lætnar kr. pr. íbúgva og samanbera okkum við t.d. Danmark. Nú er ein møguleiki fyri at gera reyp til verkætlanir.

# Tú skalt vera móti øðrum sum tú vilt hava at onnur skulu verða ímóti tær sjálvum

**Jan á Argjaboða**
*Tórshavn tann 22. apríl 2004*

Tað hevði verð trongligt her á klettunum um allir Føroyingar sum starvast ella nema sær kunnleika uttanlanda vóru riknir aftur á klettarnar.

Onki er so ringt at tað ikki er gott fyri okkurt, so um allir Føroyingar vóru riknir aftur á klettarnar hevði tað óiva loyst trupulleikarnir við avoyðinginí av útijaðarøkinum.